## DAGSINS MEINING

# Útgerðarstøðin í miðstaðarøkinum

Oljufeløgini, ið hava fingið leitiloyvi við Føroyar, hava gjørt av í eini prekvalifisering at taka út trý samtøk og velja frá tvey til at kunna bjóða uppá tænastur í sambandi við komandi útgerðarvirksemið. Grønt ljós hava Asco Føroyar saman við Strandfaraskipum landsins fingið, somuleiðis Atlantic Offshore Base saman við Skipafelagnum og síðani Eimskip saman við skotska útgerðarfelagnum SBS. Reyða kortið hava Smyril Line og Norserv, ið er samstarv millum Henning Thomsen og Danbor í Esberg, fingið. Punktum er sett fyri útgerðarhavn í Suðuroynni, um vit ganga út frá, at valið, ið fellur á Tórshavn ella Runavík, verður at galda fyri allar tíðir.

Hetta málið hevur verið eitt av teimum stóru stríðsmálunum í debattini í eina tíð. Eftir at uppskot um at leggja alt virksemi til Suðuroynna fyri at skapa henni møguleikar at menna seg, fall á tingi, varð samtykt, at útgerðarvirksemi eisini verður lagt til útjaðaran. Í útboðstilfarinum, sum tey trý vinnandi samtøkini hava fingið, stendur, at oljuútbúnaður ol. í sambandi við oljuverju, skal liggja í Suðuroynni. Um hetta eisini skal skiljast sum tilbúgving í víðastu merking er neyvan hugsandi ella?

Nú verður so spurningurin, um landsstýrismaðurin í oljumálum metir, at hann hevur livað upp til krøvini í oljulógini um eisini at taka hædd fyri útjaðaranum við at hava fingið feløgini at seta hetta við oljuverju í tilboðstilfarið? Tað verður áhugavert at frætta. Neyvan hava politikarnir í Suðuroynni heldur sagt síðsta orð.

Hetta málið er eitt áhugavert - onkur vil siga syrgiligt, onkur vil siga skilagott - kapittul í føroyskari søgu. Tí øðrumegin eru tað tey, ið siga, at her hevði tú møguliga at stýra eini vinnu til at menna ein tilafturkomnan part av landinum - hinumegin vilja onnur siga, at nú sluppu fríu marknaðarkreftirnar og fakliga professionalsman at royna seg.

Statoil valdi at skipa eina prekvalifisering. Hon vrakaði eitt av stóru feløgunum Norserv, ið hevði útgerðarstøð við drúgvum royndum aftanfyri seg. Hevði tað ikki verið lættari fyri allar, um Statoil gav øllum eins tjans at bjóða? Hetta er so teirra praksis, men spurningurin er tó - og hetta er eisini møguliga nakað, ið Oljumálastýrið hevði kunnað ávirkað um ikki Statoil bara átti at skipað fyri útbjóðing fyri allar? Vit kenna ikki orsøkina til, at Norserv dumpaði, men mong eru ørkymlað, nú eitt felag, ið hevur stóru útgerðarstøðina í Esbjerg aftanfyri seg, ikki so frægt sum slapp at geva tilboð. Er Danbor í Esbjerg veruliga ikki egnað at geva tilboð uppá eina føroyska útgerðarhavn! Ella vóru hesir so tryggir uppá sína sak, at teir gloymdu, at eisini aðrir stórir vóru við?

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

**Dinna Dalsgarð 85 ár**



Í dag verður Marin Kristina Dalsgarð á Argjum 85 ár. Tey eru rættiliga mong, sum kenna hana, men ivaleyst best sum Dinnu. Og eru nógv, sum kenna hana, so kennir hon so sanniliga eisini nógv fólk.

Dinna er ættað úr Sandavági, men fór sum heilt ung til Havnar at tæna. Og í Havn, ella rættari á Argjum, varð hon verðandi.

Hon giftist í 1937 við Ólavi Dalsgarð av Velbastað. Ólavur, sum rættiliga nógv fólk kendu av Tórshavnar Skipasmiðju, doyði í 1998.

Dinna og Ólavur fingu átta børn. Tríggjar døtur og fimm synir. Tvíburðar ímillum. Ommu- og abbabørn og seinni langommu- og abbabørn løgdust til.

Tey búsettust fyrst í Bringsnagøtu í Havn og fluttu síðan út í Rættará. Fyri umleið hálvari øld síðan fluttu tey út á Argir, har tey síðan búðu, og Dinna enn býr.

Dinna er sjáldsama gløgg og fylgir við sum nakar unglingi. Tað man neyvan vera kona á hennara aldri, sum er so væl inni í tí, sum rørist í heimssamfelagnum. Hon er stutt sagt ótrúlig at koma inn til. útvarp Føroya, Rás 2, Lindin, BBC tv ella onkur onnur sjónvarpsstøð. Alt gongur í senn. Bløðini liggja frammi, og hon lesur tey og klippir út og goymir. Og tað sær ikki mætari út, enn at hon klárar at fylgja við øllum i senn. Í øllum førum veit hon akkurat, hvat tey hava sagt og skrivað. Og ítróttinum hevur hon stýr á. Kennir at kalla hvørt einasta úrslit, sum verður kunngjørt. Tú undrast, hvussu tað kann bera til. Men tað nyttar einki at undrast, tí hetta er bara so.

Og sum tað ikki var nokk, so eru tað allir merkisdagarnir, hon hevur skil á. Hon kennir øgiliga nógv fólk. Og ikki bara kennir tey, Hon fylgir teimum eisini. Veit, nær tey hava føðingardag, brúdleypsdagar, nær tey fara hiðani og alt, sum er at skráseta.

Men soleiðis hevur hon altíð verið. Eitt lívsstykki frá fyrsta degi. Hon hevur so sanniliga eisini roynt at spælt til dans í Sandavági á ungum árum. Á mandolin. Nei, ver ikki fyri.

Familjukær er hon sum fá. Og gáttin er eisini lág. Er egni barnaflokkur hennara stórur, klárar beiggin í Sandavági hana kortini. Hann fekk níggju. Eisini tvíburðar. Og at koma til »fastur« er bara tað sama sum at koma heim til sín sjálvs, láta tey at har vesturi.

Dinna hevur alla sína tíð gingið heima og passað børnini og seinni ommubørnini og øll hini, sum komu inn á gólvið at fáa sær døgurða. Sum ommudóttirin segði nú hendan dagin:

»Hotellið er altíð opið«.

Komu knappliga ein dag fleiri inn á gólvið, enn hon júst tá hevði gjørt døgurða til, já, so kláraði hon altíð at sjóða okkurt saman, so tað endaði við, at einir fimm rættir stóðu á borðinum. Soleiðis.

Og tað heldur bara á. Hon er stutt sagt ótrúlig.

Hjartaliga tillukku við teimum 85 árunum og mong góð ár enn.


†

Leygardagin, trettandadag 6. januar tók Harrin
kæru konu mína, mammu, vermóðir,
ommu og langommu okkara

**ELMU MORTENSEN,**
**á Argjum, 88 ár**

heim til sín.

Jarðarferðin verður í dag,
mikudagin 10. januar kl. 13.00

Minningargáva kann latast til leguhúsið í Nesvík.

**Johannes, Gertrud, Ragnhild, Karin, Gudmund,**
**Sólbjørg og Jens Mortan við familju**



**Tøkk**

Hjartaliga tøkk fái øll tit, sum gleddu meg á mínum 75 ára føðingardegi tann 15. desember í 2000. Tit gjørdu mær dagin ógloymandi, tí tit vóru so heilt óvæntað mong, sum komu inn á gólvið og bóru mær heilsanir frá mongum øðrum. Takk fyri allar gávurnar og allar blómurnar. Og tøkk fái øll tit, ið so fjølment ringdu og ynsktu mær tillukku.

Gott nýggjár og Gud signi tykkum øll.

**Bergtóra Jacobsen úti í Grønlandi**



**Tøkk**

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu
og hjálpsemi, tá okkara kæra mamma, vermamma,
omma og langomma

**Magdalena Joensen (Mena)**
**Hvítanes**

andaðist og varð jarðað, takka vit hjartaliga.

*Vegna tey avvarðandi*

**Poul Åge, Marius, Andreas, Eyðun,**
**Lena og Bergtóra**



Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Gera eina roynd afturat

**Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fer aftur seinni í vikuna at gera eina roynd at fáa semju um lønina hjá teimum, ið skulu sigla við vaktar- og bjargingarskipinum, Brimli**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Seinni í hesi vikuni verður ein roynd gjørt afturat at fáa semju um lønina hjá teimum, sum skulu sigla við Brimli.

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at hann fer at kalla partarnar í málinum til fundar ein av fyrstu døgunum at vita, um tað ikki ber til at fáa gongd á samráðingarnar.

– Tá fari eg at spyrja teir, um teir framvegis ikki meta, at teir eiga at gera sítt til at finna eina samráðingarloysn.

Hann vil ikki siga, um hann hevur nakað tilboð til manningarfeløgini við sær á fundin, sum verður.

– Vit fara at gjøgnumganga málið fyri at vita, um tað yvirhøvur ber til at semjast um nakað.

Men tað skilst á honum, at hann hevur ikki serliga góðar vónir.

– Higartil hevur tað bara verið annar parturin sum hevur viljað samráðst og tað er Fíggjarmálstýrið. Hinvegin hevur mótparturin als ikki viljað samráðst, og sostatt hava ongar samráðingar verið yvirhøvur , sigur Karsten Hansen.

Hann sigur, at síðani manningarfeløgini settu síni krøv fram, hava teir ikki vilja vikað seg ein tumma og so ber ikki til at tosa um samráðingar.

### Vita um vilji er

Karsten Hansen vil ikki siga, um hetta verður seinasta royndin at finna eina samráðingarloysn.

– Vit kunnu so ikki halda fram uppá hendan mátan. Og nú mugu vit fáa staðfest, um tað yvirhøvur er nakar vilji at samráðast.

Hann sigur, at tað er ikki serliga hugaligt at halda fram uppá hendan mátan.

– Vísir tað seg at ongin vilji er til at samráðast, mugu vit taka støðu til, hvat vit so kunnu gera.

Og ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er at leggja málið fyri tingið.

Karsten Hansen sigur, at onki er avgjørt í samgonguni um at leggja málið fyri tingið, ella um at málið ikki skal fyri tingið.

– Eg havi ikki roynt at fáa málið fyri tingið. Tað er ímóti míni sannføring at slík mál verða løgd fyri tingið, tí fakfeløg hava sín samráðingarrætt og tað eiga vit at virða.

– Men í hesum førum tykist tað sum um tað eru fakfeløgini, sum vilja hava málið fyri tingið, tí tey vilja hvørki samráðast, ella hava semingsmann uppí. So tað ber ikki til at koma til aðra niðurstøðu enn at feløgini vilja hava málið fyri tingið. Í so máta er hendan støðan heilt óvanlig, sigur Fíggjarmálaráðharrin.

Karsten Hansen vísir eisini heilt avgjørdur aftur, tí, ið onkur hevur havt illgruna um, at hann bara ætlar at draga málið út og at súlta málið til vanligar samráðingar verða aftur í vár.

– Ongin kann skjóta okkum tað í skógvarnar. Vit hava samráðst alla tíðina og vit hava givið teimum ymisk tilboð um, hvussu málið kann loysast. Men tað eru fakfeløgini, sum ikki vilja flyta seg. Higartil hava tey verið fullkomiliga steinrunnin, sigur Karsten Hansen.

Tað skilst á øllum brøgdum, at tað er farið at hava skund at fáa málið um Brimil avgreitt. M.a. vil Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hava, at støðan í samráðingunum nú verður gjørd upp. Hann hevur skrivað Karsten Hansen bræv, har hann biðjur hann staðfesta, um tað yvirhøvur ber til at koma longri við samráðingum, ella ikki.

– Nú er so langt útliðið, at tað eigur at bera til at staðfesta, um tað slepst víðari við samráðingum, ella ikki. Og slepst tað ikki longri, eigur málið at verða loyst uppá onkran annan máta, tí Brimil kann ikki blíva liggjandi í Noregi. Hann heldur, at tað er umráðandi at fáa Brimil í tænastu, nú, tí nú byrjar várróðurin skjótt og tá er trygdin nógv betri við tveimum skipum, enn bara við Tjaldrinum.




*– Nú bendir alt á, at tíðin er farin at nærkast, har lagnan hjá nýggja vaktar- og bjargingarskipinum, Brimli, verður avgjørd*

# Fegnast um nýggja kommunulæknan

**Fyri sunnan í Eiðis læknadømi fegnast fólk um, at landsstýrismaðurin fer at søkja eftir einum kommunulækna afturat til læknadømið**

KOMMUNULÆKNAR
*Eyðun Klakstein*



*Fólk fyri sunnan í Eiðis læknadømi fegnast um at fáa ein lækna afturat í økinum*

Boðini frá Helenu Dam á Neystabø mánadagin um, at Almanna- og Heilsumálastýri fer at søkja eftir einum kommunulækna afturat til Eiðis læknadømi, komu væl við í økinum.

Kommunurnar fyri sunnan í Eiðis læknadømi hava í nógv ár stríðst fyri at fáa ein kommunulækna afturat til økið, og tað er umsíðir eydnast.

– Vit eru ómetaliga fegin um, at landsstýrismaðurin hevur tikið hesa avgerðina, sigur Jógvan Mørkøre, sum er bygdaráðsformaður í Hósvík og ein av frontmonnunum í felagskommununi í Sundalagnum.

– Síðani fyrst í 70'unum hava vit ynskt at fingið ein kommunulækna afturat, men tað er ikki fyrr enn nú, at vit hava fingið okkara ynskið eftirlíka, og tað eigur Helena Dam á Neystabø stóran heiður fyri, sigur hann.

### Sleppa undan at fara til Eiðis

Eiðis læknadømi umfatar Eiðis, Sunda, Hósvíkar, Halldórsvíkar, Funnings og Gjáar kommunur.

Ein lækni hevur verið knýttur at hesum læknadømi, og hann hevur havt nógv at gera. Viðtaluhøli eru bæði á Eiði og á Oyrabakka, og ætlanin er, at bæði hølini skulu nýtast í senn, tá nýggi kommunulæknin verður settur um nakrar mánaðir.

– Fólk er í økinum vænta nú, at tey sleppa undan at fara norður til Eiðis, tá tey skulu til lækna. Felagskommunan hevur gjørt nógv við læknaviðtaluhølini á Oyrabakka, og vit vænta, at tey fara at verða nýtt framyvir, og at neyðuga útgerðin verður í teimum, sigur Jógvan Mørkøre.